Sosialurin
# VARPIÐ
FRÍGGJADAGUR 6. februar 2004



**Danskt Melodi Grand Prix 2004**

So er aftur donsk songkapping á skránni og sum ikki eina ferðina, so eru vit væl og virðiliga umboðað av gøtugentuni Petsy Tvørfoss. Kappingin verður send beinleiðis úr Århus og vertir eru Natasja Crone og Peter Mygind. Tann, sum vinnur kappingina, skal umboða Danmark í evropeisku sangkappingin, sum verður send úr Turkalandi í mei.
**Leygardagin kl. 19.00**





**State and Main**

Filmstjørnan Bob Barrenger hevur serligan hug á ungum gentum, hetta førir við sær at hann og filmslið hansara verða koyrd úr New Hampshire, har sum seinasti filmur hansara skuldi gerast, "The Old Mill". Ístaðin fer filmsliðið til lítla býin Waterford í vakra statinum Vermont. Hetta er ein skemtifilmur við Alec Baldwin og øðrum kendum.
**Týsdagin kl. 20.00**

**Bluff**

Í slóðbrótandi, dansku undirhaldssendingini »Bluff« snýr tað seg um at bluffa vinirnar. Í sjónvarpshølunum presentera vertirnir, Tomas Villum Jensen og Uffe Holm, teir báðar høvuðspersónarnar. Høvuðspersónarnir skulu kappast um, hvør er betri at fáa vinir og familju at trúgva einari ørligari søgu eftir tí aðrari.
**Tysdagin kl. 19.00**

Televarpið
Fleiri rásir - einki roks
Filmir í hópatali • Barnasendingar • Dokumentar • Náttúra • Tíðindi alt samdøgrið